# Uttan torv var



*Petur Jacob Sigvardsen leggur bókina fram í Miðlahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

UMRØÐA

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Árini 2002-2004 var eg javnan gestur á Landsskjalasavninum í samband við kanningararbeiði í ævisøguni um Kaj í Hvannasundi. Í lesistøvuni komu javnan fólk, sum ein so spakuliga lærdi at kenna. Tað var ikki altíð, at ein kom í prát beinanvegin. Øll vóru upptikin av sínum, sótu í djúpun tonkun leitandi dag eftir dag. Av hesum fólkum, sum tá sótu og granskaðu síggjast bøkur prentaðar í dag, meðan onnur ikki hava granskað við útgávu fyri eyga.

Petur Jacob Sigvardsen, rithøvundur og Absalon Absalonsen, rithøvundur úr Vági vóru báðir javnan at síggja á lesistovuni, og teir eru báðir komnir við útgávum í ár, sum millum annað eisini byggja á hetta granskingararbeiði.

Íkvøld siti eg við verkinum frammanfyri mær: Torvið í Føroyum. Úrslitið av 25 ára kanningararbeiði og eg kenni ikki sørt eyðmýkt, at skriva nøkur orð um hesar reglur. Eg skrivi av huga, evnið hevur mín áhuga, og mær hevur unnast at fylgja við arbeiðinum hjá høvundanum seinastu árini, har vit hava havt mangt prátið um gransking í samband við bókaskriving. Eg havi kent Petur Jacob Sigvardsen um ein starvsfelaga við nógv størri royndum enn eg. Og hvussu skrivar mann um eina torvsøgu, her er einki fordømi, talan er um frumarbeiði frá fyrsta stavi so at siga.

Í Oyndarfirði varð sagt um gjáarmenn, tá íð eg var smádrongur, at teir vóru so fjantutir. Gjáarmenn hava helst sagt okkurt líknandi um oyndfirðingar sjálvandi, tí her er ikki talan um annað enn spegling.. Søgan um torvið er í hvussu er ikki nakað fjant. Hon er ein neyv gjøgnumgongd av søguni hjá okkara fremstu fyritreyt fyri lívi í Føroyum gjøgnum alla søguna. Torvið var fortreytin fyri at føroyingar kundu fáa fløva í døgurðapottin, hita í súpanina, hita í kroppin.

Tá íð eg var smádrongur í Oyndarfirði fyrst í sekstiárunum var bara ein eftir, sum skar torv. Tað var John í Stovuni, sum hevði eina krógv frammi á Fløtum. Hann skar torv fram til at konan doyði í 1965, síðan gavst hann og primusurin tók yvir og hitaði henda einsamalla einkjumann.. Hann doyði í 1976 og átti tá einasta húsið í Oyndarfirði uttan elektrisistet. Eg minninst enn hvussu hann skar, hvussu hann fekk torvið til høldar og hvussu hann pyntaði krónna við gomlum sekkjum oman á.

Torv er í dag søga og eisini nostalgi, ein syrgin afturtrá til eina farna tið, sum ongantíð kemur aftur. Verkið hjá Petur Jacob Sigvardsen slær hetta fast í seinasta bindinum uttan beinleiðis at siga tað. Føroyingar nýta í dag 70 ferðir so nógva sum vit nýttu í árunum 1769-1945 árliga í meðal. Tað vil siga, at um føroyingar framvegis nýttu torv, so var einki torv eftir.

## Ein ferð gjøgnum okkara søgu

Tað er ikki hissini søga Petur Jacob Sigvardsen leiðir okkum í gjøgnum í verkinum. Innihaldsyvir-